Nólsoyar Pálsgøta 32
700 Klaksvík
Tlf. 410000 Fax 410001

Ár 2011, hin 26. apríl kl. 17:30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:
Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim, Atli S. Justinussen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Óli M. Lassen, Auðunn Konráðsson, Signhild V. Joensen, Jákup F. N. Mikkelsen, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð og Hans Arne Bertholdsen.

2011/030.
08/00135 Val av nevndum – Sjálvsognarstovnurin undir Kráarbrekku

Á býráðsfundinum 22. mars 2011 vórðu varalimir valdir fyri býráðsumboðini í nevndini fyri Sjálvsognarstovnin undir Kráarbrekku. Enn vantar at velja varalim fyri Knút Olsen.

Limur: Varalimur:
Knút Olsen

Býráðsins samtykt:
Maiken Skarðenni vald sum varalimur.

2011/031.
11/00338 Staðfest tap, skuldarar 2010

Vísandi til lista yvir upphæddir fyri 2010, sum umsitingin metir at vera virðisleysar, mælir roknskaparleiðarin í skrivi, dagfest 8. apríl 2011, til at góðkenna upphæddirnar sum endaliga mistar.

Havna- og Vinnunevndin hevði málið til kunning á fundi 12. apríl 2011.

Tekniska Nevnd staðfestir málið á fundi 12. apríl 2011.

Sosiala Nevnd staðfestir málið á fundi 13. apríl 2011.

Mentanarnevndin tekur á fundi 13. apríl 2011 undir við tilmælinum frá umsitingini, 8. apríl 2011.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl undir við Havna- og Vinnunevndini og Teknisku Nevnd 12. apríl 2011 og Sosialu Nevnd og Mentanarnevndini 13. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/032.
11/00254 Serflutningsskipanin – roknskapur 2010

Í skrivi frá Roknskapardeildini, dagfest 8. apríl 2011, verður eitt avlop á kr. 28.320,- staðfest. Mælt verður eisini til at góðkenna roknskapin fyri 2010.

Sosiala Nevnd tekur á fundi 13. apríl 2011 roknskapin til eftirtektar.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl 2011 undir við Sosialu Nevnd 13. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt – roknskapurin góðkendur.

2011/033.
11/00187 Dr. Margrethu Barnagarður – roknskapur 2010

Grannskoðaði roknskapurin 2010 fyri Dr. Margrethu Barnagarð vísir eina minni nýtslu uppá 82 tkr. Sí skriv frá Roknskapardeildini, dagfest 8. apríl 2011, har staðfest verður, at gjaldførið er gott, og har mælt verður til at góðtaka roknskapin fyri 2010.

Sosiala Nevnd tekur á fundi 13. apríl 2011 roknskapin til eftirtektar.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl 2011 undir við Sosialu Nevnd 13. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt – roknskapurin góðkendur.

2011/034.
11/00231 Mylnuhúsið – roknskapur 2010

Grannskoðaði roknskapurin 2010 fyri Mylnuhúsið vísir eina minni nýtslu uppá 215 tkr. Sí skriv frá Roknskapardeildini, dagfest 8. apríl 2011, har mælt verður til at góðtaka roknskapin fyri 2010, samstundis sum staðfest verður, at likviditeturin hjá stovninum er vánaligur, og verður tí mælt frá at krevja avlopið innaftur til kommununa.

Sosiala Nevnd tekur á fundi 13. apríl 2011 roknskapin til eftirtektar.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl 2011 undir við Sosialu Nevnd 13. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt – roknskapurin góðkendur.

2011/035.
11/00131 Klaksvíkar Bókasavn – roknskapur 2010

Grannskoðaði roknskapurin 2010 fyri Klaksvíkar Bókasavn vísir eina minni inntøku á 46 tkr. Sí skriv frá Roknskapardeildini, dagfest 8. apríl 2011, har greitt verður frá, hví so er. Mælt verður til at góðtaka roknskapin fyri 2010.

Mentanarnevndin góðtekur á fundi 13. apríl 2011 roknskapin.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl 2011 undir við Mentanarnevndini 13. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt – roknskapurin góðkendur.

2011/036.
10/00334 Uppfylging av spillivatnsætlan

Klaksvíkar Kommuna hevur fingið aftursvar frá Umhvørvisstovuni, 23. mars 2011, uppá innlætnu Spillivatnsætlan kommununnar, sí skriv í málinum. Sambært skrivi frá umsitingini, dagfest 8. apríl 2011 skal støða takast til fylgjandi: 1. Felags tíðarætlan, fígging og raðfesting, 2. T.U. mælir til, at kr. 14,1 mió. verða setta av aftrat í ár, 3. Mælt verður til, at útleiðingarnar í Borðoyarvík verða beindar til Klaksvíkar, og 4. At uppskot 1 (P/f Sofus M. Jakobsen) verður valt.

Heilsu- og Umhvørvisnevndin tekur á fundi 11. apríl 2011 undir við tilmæli frá umsitingini, 8. apríl 2011.

Havna- og Vinnunevndin tekur á fundi 12. apríl 2011 undir við Heilsu- og Umhvørvisnevndini 11. apríl 2011.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 12. apríl 2011 undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 8. apríl 2011 tó undantikið pkt. 2. Nevndin heitir á umsitingina um at fara í samráðingar við myndugleikarnar um eina longri tíðarætlan. Nevndin mælir eisini til, at málið verður reist í KSF.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl 2011 undir við Teknisku Nevnd 12. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá Teknisku Nevnd og Fíggjarnevndini varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og 0 ímóti.

2011/037.
10/00325 Bygging av røktarheimi – ráðgevingaravtalur

Umsitingin mælir í skrivi um víðari gongd í málinum og val av útbjóðingarhátti, byggiharraráðgeva og stýrisbólki, dagfest 7. apríl 2011, til, *at leistur um útbjóðing (sum lýstur í skrivinum) verður fylgdur, *at umsitingin fær heimild til at gera avtalu um byggiharraleiklut sambært leisti (í áðurnevnda skrivi) og áður samtyktur av býráðnum, og *at ein stýrisbólkur verður settur (sum lýst í skrivinum).

Tekniska Nevnd tekur á fundi 12. apríl 2011 undir við tilmælinum frá umsitingini, 7. apríl 2011.

Sosiala Nevnd tekur á fundi 13. apríl 2011 undir við tilmælinum frá umsitingini. Ein minniluti, Atli S. Justinussen, mælir til, at arbeiðið verður útboðið lokalt.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl 2011 undir við Teknisku Nevnd 12. apríl 2011 og meirilutanum í Sosialu Nevnd 13. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá minnilutanum í Sosialu Nevnd fall við 2 atkvøðum fyri (Atli S. Justinussen og Steinbjørn O. Jacobsen) og 8 ímóti (Auðunn Konráðsson, Óli M. Lassen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Signhild V. Joensen, Jákup F. N. Mikkelsen, Óluva Klettskarð og Hans Arne Bertholdsen). Elsebeth M. Gunnleygsdóttur atkvøddi ikki.

Tilmælið frá Teknisku Nevnd, meirilutanum í Sosialu Nevnd og Fíggjarnevndini varð samtykt við 8 atkvøðum fyri (Auðunn Konráðsson, Óli M. Lassen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Signhild V. Joensen, Jákup F. N. Mikkelsen og Steinbjørn O. Jacobsen) og 0 ímóti. Atli S. Justinussen, Óluva Klettskarð og Hans Arne Bertholdsen atkvøddu ikki.

2011/038.
11/00107 Fyrispurningur um íbindingargjald

Spurningurin, um arbeiðast skuldi við møguligari lækking í gjaldinum, var til prinsippiella viðgerð í Teknisku Nevnd og Býráðnum í februar umfarinum. Tá varð avgjørt, at arbeiðast skuldi víðari við málinum. Í tíðarskeiðinum nov. 2007 til d.d. hava fýra grundøkir í Klaksvík og á Norðoyri goldið hægra íbindingargjaldið. Um vendast skal aftur til lægra íbindingargjaldið, má peningur finnast til endamálið. Sí eisini skriv frá umsitingini, dagfest 7. apríl 2011.

Tekniska Nevnd mælir á fundi 12. apríl 2011 til at venda aftur til byggibúningargjaldið, sum var galdandi fram til november 2007. Nýggja skipanin verður sett í verk 1. januar 2012, og peningur kr. 156.560,- verður settur av á fíggjarætlanini fyri 2012 til afturgjalding av meirkostnaði fyri fýra grundstykir, sambært skrivi frá umsitingini, dagf. 7. apríl 2011.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl 2011 undir við Teknisku Nevnd 12. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/039.
10/00002 Stovnsetan av NSR-tænastu í Norðoyggjum – *1. viðgerð*

Víst verður til skriv frá umsitingini, dagfest 4. apríl 2011, og til fundarfrásøgn, dagfesta 29. mars 2011, um royndarskipan fyri Námsfrøðiligu Ráðgevingina í Klaksvíkar Kommunu og Sernám í Norðoyggjum. Um so er, at kommunan tekur undir við tiltakinum, má peningur finnast til endamálið. Umsitingin hevur onga konto at vísa á, sí skriv, dagf. 4. apríl 2011.

Sosiala Nevnd mælir á fundi 13. apríl 2011 til, at kr. 150.000,- verða tiknar av íløgujáttanini “Bygging av røktarheimi”.

Mentanarnevndin tekur á fundi 13. apríl 2011 undir við Sosialu Nevnd 13. apríl 2011.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl undir við Sosialu Nevnd 13. apríl 2011 og Mentanarnevndini 13. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið frá Steinbjørn O. Jacobsen, um at taka undir við fyriliggjandi tilmæli, og at samráðingar verða við kommunurnar í Norðoyggjum um tann fíggjarliga partin, fall við 4 atkvøðum fyri (Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð, Hans Arne Bertholdsen og Atli S. Justinussen) og 6 ímóti (Auðunn Konráðsson, Óli M. Lassen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Signhild V. Joensen og Jákup F. N. Mikkelsen). Elsebeth M. Gunnleygsdóttur atkvøddi ikki.

Fyriliggjandi tilmæli, og at arbeitt verður víðari við málinum, sum verður lagt fyri aftur til endaliga samtykt av skipanini, varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (Auðunn Konráðsson, Óli M. Lassen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Signhild V. Joensen og Jákup F. N. Mikkelsen) og 1 ímóti (Steinbjørn O. Jacobsen). Atli S. Justinussen, Óluva Klettskarð og Hans Arne Bertholdsen atkvøddu ikki.

2011/040.
09/00879 Innrætting av kjallaranum í Sambýlinum á Heygnum – *1. viðgerð*

Í skrivi frá umsitingini, dagfest 4. apríl 2011, um liðugtgerð av trappugongd í kjallaranum í Sambýlinum á Heygnum stendur, at neyðugt varð at seta í gongd arbeiðir fyri ein kostnað á kr. 63.000,- u/mvg. Málið varð viðgjørt sum skundmál, vísandi til heimild borgarstjórans og nevndarforkvinnunnar sambært §§ 21 og 31 í Kommunustýrislógini. Sí annars aðurnevnda skriv, har fíggingin eisini verður útgreinað.

Sosiala Nevnd tekur á fundi 13. apríl 2011 undir við málinum.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl 2011 undir við Sosialu Nevnd 13. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/041.
08/00149 Um- og nýbygging, Skúlin við Ósánna – talgildar talvur og møblar til 3. byggistig – *1. viðgerð*

Sambært skrivi frá umsitingini, dagfest 7. apríl 2011, kosta nýggir møblar til 3. byggistig uml. 750 tús. kr. og talvurnar uml. eina mió. kr. Býráðið hevur játtað kr. 57,6 mió. til samlaðu um- og nýbyggingina. Eftir av nevndu upphædd, sum ikki er disponerað, eru 400 tús. kr. til ymiskar óvæntaðar útreiðslur. Haraftrat standa 400 tús. kr. á fíggjarætlanini fyri 2011, sum eru ætlaðar at brúka til at bøta um skúlagarðsviðurskiftini.
Mælt verður til, at málið um talgildu talvurnar verður loyst leyst frá byggimálinum, tí rúm er ikki fyri keypinum í játtanini, soleiðis sum vónað hevur verið. Hetta krevur serskilda loysn av málinum. Um býráðið samtykkir, at nýggir møblar skulu keypast, so er neyðugt við einari eykajáttan á 750 tús. kr.

Tekniska Nevnd hevði málið til kunning á fundinum 12. apríl 2011.

Mentanarnevndin mælir á fundinum 13. apríl 2011 til, at veittar verða kr. 750.000,- sum eykajáttan til keyp av innbúgvi. Nevndin ger annars vart við, at hon ivast í, um kr. 400.000,- eru settar av til at "bøta um skúlagarðsviðurskiftini".

Fíggjarnevndin vísir á fundi 14. apríl 2011 til samtyktina í Mentanarnevndini 13. apríl 2011 og mælir til, at játtanin til skúlagarð, áljóðandi kr. 400.000,- veður brúkt til keyp av innbúgvi, og at írestandi upphæddin, kr. 350.000,- verður fíggjað sum eykajáttan.

Býráðsins samtykt:
Vísandi til, at tær í málinum nevndu kr. 400.000,- ikki eru settar av til at "at bøta um skúlagarðsviðurskifti", men er ein íløguavseting til Skúlan við Ósánna, tekur býráðið undir við tilmælinum frá Fíggjarnevndini.

2011/042.
10/00892 P-pláss omanfyri bátabrúgvarnar – eykajáttan – *1. viðgerð*

Í skrivi frá umsitingini, dagfest 12. apríl, stendur m.a., at í sambandi við at arbeiðið upp á parkeringsplássið omanfyri bátabrúgvarnar fór í gongd, varð ein meting gjørd yvir kostnaðin av hesum arbeiði uppá kr. 3.034.000,-. Arbeiðið skuldi fíggjast av peningi, sum kom inn fyri søluna av grundøkinum til FK , sum var uppá kr. 2,7 mió. Av tí at veðrið hevur verið so vánaligt í vetur, hevur hetta arbeiðið drigið út, men er nú um at verða liðugt. Mett verður, at samlaða nýtslan til arbeiðið í ár verður kr. 1,8 mió. kr., og mælt verður til, at eykajáttan verður latin til hetta.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 12. apríl 2011 undir við tilmælinum frá Teknisku Umsiting, dagfest 12. apríl 2011

Fíggjarnevndin tekur á fundi 14. apríl 2011 undir við Teknisku Nevnd 12. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.
Atli S. Justinussen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli, vegna ógegni.

2011/043.
11/00179 Byggiloyvi til sethús – frávik frá bygging um byggilinju

Borgarin søkir um frávik frá byggisamtyktini grundað á, at parturin uttanfyri byggilinjuna er tann lægsti parturin av húsunum og á ongan hátt kemur at skemma útsýnið fyri húsunum omanfyri. Umsitingin mælir í skrivi, dagfest 8. apríl 2011, til at halda fast við treytirnar í byggisamtyktini, tí eitt frávik beinanvegin í nýggjari útstykking lættliga kann skapa fordømi fyri komandi byggimál.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 12. apríl 2011 undir við tilmælinum frá umsitingini, 8. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2011/044.
10/01090 Frávik fyri byggiloyvi til innilokan av túni

Býráðið samtykti 2. oktober 2007 at viðmæla marknaumskipan í økinum, soleiðis at matr. nr. 433, sum tá var felagsogn hjá matr. nr. 431 og 432 bleiv býtt sundur, so at hvør fekk sín sjálvstøðuga part. Í sambandi við marknaumskipanina mælir byggifulltrúin til at játta byggiloyvi til innilokan av túninum millum bygningarnar. Viðgerðin og tilmælið vórðu gjørd út frá ásetingunum í gomlu byggisamtyktini, sum var í gildi tá. Málið varð síðani sent til Matrikulstovuna at skipa marknaumskipanina, og haðani kom góðkenning 11. februar 2011. Í millumtíðini er nýggj byggisamtykt sett í gildi (sept. 2008), sum forðar fyri bygging á økinum í tann mun, sum tann fyrra loyvdi, og sum var tankin aftanfyri marknaumskipanina. Út frá omanfyri nevnda metir Tekniska Umsiting tað vera í lagi at játta frávik fyri ábyggingarstignum, soleiðis at umsóknin um innilokan av túninum kann verða gingin á møti. Umsøkjarin verður tó at senda inn nágreiniligar tekningar til sjálva byggimálsviðgerðina.

Tekniska Nevnd tekur á fundi 12. apríl 2011 undir við tilmælinum frá umsitingini, 8. apríl 2011.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

Frammanfyri standandi mál eru viðgjørd á almennum fundi.